# HT-Open

14 telvarar tóku lut í vikuskiftiskappingini HT-Open, sum varð hildin í hølum Havnar Telvingarfelags 27. – 29. januar 2012. Eitt harmiliga lágt luttakaratal í einari kapping, sum fyri ikki nógvum árum síðani var eitt av hæddarpunktunum í føroyska talvkalendaranum.

Hóast IM Helgi Dam Ziska var styrkismettur væl omanfyri nærmastu avbjóðararnar, kundi hann vænta sær dygga mótstøðu frá serliga sandavágsbrøðrunum, Rógva og Høgna Egilstoft Nielsen, sum fyri stuttum skaraðu framúr í einari aðrari vikuskiftiskapping: Rókur Open. Tað skuldi tó vísa seg at vera ein fjórði luttakari, sum fór at taka øll á bóli hetta vikuskiftið. Maðurin var vestmenningur. Maðurin var Jákup á Rógvu Andreasen.

Fyrsta umfar gekk sum proffesari Elo hevði prædikað: favorittarnir vunnu øll talvini. Í øðrum umfari sá út til at bera sama veg, tó at ungi Bjarni Brimnes var væl við í talvinum ímóti Finn W. Larsen, og Jákup helt tørn ímóti Helga. Bjarni mátti at enda lúta ímóti vælleikandi HT-formanninum, men á hinum borðinum gjørdi Jákup bart og knógvaði kappingarfavorittinum við einari kombinatión, sum neyvan verður niðurafturløgd við bræði. Vit fáa talvið í fullum líki:

**Ziska, Helgi Dam (2460) - Andreasen, Jákup á Rógvu (1979)**

HT-Open (2), 28.01.2012

**1.e4 c5 2.Nf3 Nc6 3.Bb5 e6** Diagram



**4.0–0** [4.Bxc6 skaðar svørtu finnustøðuna og er helst eitt sterkari framhald.] **4...Nge7 5.Re1** Gevur bispinum pláss at bakka aftur á f1. **5...Ng6 6.c3 Be7 7.d4 a6 8.Bf1 Qc7**

**9.Be3** Diagram



**9...b6** Svartur leikar róligt og umhugsið. [9...cxd4 hevði loyst spenningin millum finnurnar ov tíðliga: hvítur fær tá gagn av opnu c-linjuni og sleppur út á c3 við riddaranum.] **10.Nbd2 0–0 11.Rc1** Diagram



Fyri at kunna bakka aftur á b1 við bispinum (eftir eitt komandi Bd3 og ...Rif4) uttan at búra rókin inni á a1.

[Her var 11.d5 tó sterkari: 11...Nce5 12.Nxe5 Nxe5 13.f4 Ng6 14.Nc4! við ætlanini at gaffla frúnna og bispin við d6 í næsta leiki. Eftir 14...exd5 15.exd5 d6 16.a4 stendur hvítur væl.]

**11...Bb7 12.Bd3 f6 13.Nf1 Rad8 14.Ng3 Nf4**

**15.Bb1 d5!?** Diagram



Áhugavert framhald: svartur offrar eina finnu fyri aktivt spæl. **16.Bxf4 Qxf4 17.exd5 Rxd5** Diagram



**18.Qc2?!** Ikki tað neyvasta.

[18.Rxe6 – við idéini at 18...cxd4? tapir orsakað av 19.Be4! Rd6 20.Bxc6 Rxe6 21.Bxb7 – gevur hvítum greiðan fyrimun.]

**18...g6**

**19.dxc5 Bxc5** Diagram




Svartur hevur nú nóg aktivt spæl fyri finnuna. Fyri at síggja hetta er nóg mikið at samanbera bispaparið hjá svørtum við riddaraparið hjá hvítum.

**20.b4 Bd6 21.Rxe6 Ne5 22.Nd4 Kf7?!** [22...Bc8 var sterkari.] **23.Nh5??** Diagram




Ein brølari í einari faktiskt góðari, men praktiskt truplari støðu. Fritz viðmælir 23.Rd1 við fyrimuni áljóðandi tvær finnur, men hesin leikurin kom mær ikki til hugs undir talvinum.

**23...Qxh2+!!** Eitt ótrúligt frúgvaoffur - sum tikið úr einari uppgávubók! Svartur vinnur umgangandi. Jákup hevði sæð henda leikin, longu áðrenn hann leikti 22...Kf7. [23...gxh5 24.Qxh7# var sjálvandi tankin handan Rih5.]

**24.Kf1** [24.Kxh2 er mát í tríggjar: 24...Nf3+ 25.Kh3 Rxh5+ 26.Kg4 Nh2#]

**24...Qh1+**

**25.Ke2 Qxh5+** Diagram



Svartur vinnur mann og hevur harumframt eitt drepandi álop. Jákup setir nú striku undir eitt vælleikt talv við orkufrekum álopsspæli: **26.f3 Rxd4! 27.cxd4 Bxf3+! 28.Kf2 Qh4+! 29.Kg1 Qxd4+** Diagram



**30.Qf2 Qxf2+ 31.Kxf2 Kxe6 32.gxf3 Bxb4 33.Rh1 h5 34.Ke2 Rd8 35.f4 Rd2+ 36.Ke3 Ng4+ 37.Kf3 Rf2+ 38.Kg3 f5**

Og hvítur takkaði fyri talvið.

**0–1**

Jákup helt fast við góða stevið og basti Høgna við hvíta fókinum í triðja umfari. Hini úrslitini hetta umfarið vóru øll sum væntað. Benni Poulsen stríddist væl ímóti Heiðriki Tindskarð Jacobsen, men havnaunglingin sýndi gott positionelt forstáilsi fyri kongaindaranum, og at enda varð trýstið á hvítu støðuna ov stórt. Eftir trý umfør var støðan í kappingini, at Jákup og Rógvi deildu fyrstaplássið við fullum stigatali.

Oddafiskarnir møttust í fjórða umfari. Rógvi telvaði nimzoindaran væl, og Jákup fekk tíðliga í talvinum trupulleikar av einari d5-finnu, sum hevði stungið seg ov langt fram uttan stuðul frá síðumonnunum. Rógvi vann eina aðra finnu, sum var komin fram á e4 at hjálpa henni á d5, og eftir hetta spældi støðan seg sjálv. Mest óvæntaða úrslitinum í fjórða umfari stóð Arnhold Davidsen fyri, tá hann við áhaldandi trýsti basti Rúna Tindskarð Jacobsen. Finn vardi borgina leingi og væl ímóti Heiðriki, men var ikki nóg neyvur í avgerandi løtuni.

Undan fimta og seinasta umfari var Rógvi einsamallur á odda við 4 av 4. Honum á baki kom ein riðil við 3 stigum: Helgi, Høgni, Jákup, Heiðrikur og Silas. Talvið millum Rógva og Helga í fimta umfari var ikki nógvar leikir gamalt, tá ið fyrrnevndi setti mann í deyða, og støðan fór fyri bakka. Høgni og Jákup vunnu somuleiðis stutt talv á ávikavist Heiðriki og Silasi. Endaliga støðan í oddinum varð tí tann, at Rógvi, Jákup, Helgi og Høgni endaðu javnir á fyrstaplásinnum við 4 stigum av 5 møguligum (raðfylgjan er sambært útroknaðum mótstøðustigum). Arnhold endaði kappingina við vælleiktum sigri á Finn og vann ratingvirðislønina í kappingini við 3 stigum.